TVØROYRAR KOMMUNA

tlf 371085
fax 371814
www.tvoroyri.fo
tvoroyri@tvoroyri.fo

Tvørávegur 37
postboks 80
FO-800 Tvøroyri

# Býráðið

**Dagfesting:** 21.12.2020 kl. 17:00
**Málnr.:**

Nevndarlimir: Kristin Michelsen, Anita Vibergsdóttir, Alvi Mortensen, Kristina Roest, Bjarni Hammer, Súsanna Bertholdsen, Bogi Johannesen

Varalimir:

Ikki møtt: (Fráboða) Alvi Mortensen

Onnur: Amy Bech

Nevndarskrivari: Fróði Mortensen

| **Málsyvirlit** | | |
|---|---|---|
| **Til støðutakan** | | |
| 3/20 | 20/00386-1 | Skjalasavnið -Leingja sáttmálan millum Tvøroyrar kommunu og Landsskjalsavnið, um skjalasavn á Tvøroyri |
| 4/20 | 20/00389-2 | Nýggjársnevndin -Umsókn um stuðul til Nýggjárshald 2020 |
| 5/20 | 20/00390-2 | Hornorkestrið -umsókn um fíggjarligan stuðul 2020 |
| 6/20 | 20/00391-2 | Susvim -umsókn um stuðul 2020 |
| 7/20 | 20/00392-1 | Føroya Eftirskúli -leigusáttmálið av Sjógøtu 2, til undirvísing |
| 8/20 | 20/00397-1 | Talgildu Føroyar |
| 9/20 | 20/00402-7 | Tryggingar -Samstarv við tryggingarmeklara-fyritøkuna Ravnur |
| 10/20 | 20/00399-1 | Útboð av rakstri av kantinuni í ítróttarhøllini |
| 11/20 | 20/00407-2 | 2. viðgerð -Eykajáttanir fyri ár 2020 |
| 12/20 | 20/00411-3 | 2. viðgerð av eykajáttan -Arbeiðsbilur til Teknisku deild |
| 13/20 | 20/00398-1 | Ásetan av býráðsfundum 2021 |
| 14/20 | 20/00172-8 | Drelnes -skaði á havnarlagið 2. viðgerð av eykajáttan |
| 15/20 | 20/00413-1 | Mýrifipan -Keypa av innbúgv |
| 16/20 | 20/00414-1 | Føroysk teldutala -stuðul til forritið "føroyski talukennarin" |

**Til kunningar**

| | | |
|---|---|---|
| 1/20 | 20/00405-2 | Skattainntøka 2020 -jan.-nov. |
| 2/20 | 20/00385-3 | Fíggjarætlan fyri Bú- og Heimatænastuna í Suðuroy - fíggjarárið 2021 |
| 3/20 | 20/00412-13 | Kunning um Korona -Økið til Poding |
| | | |

Til støðutakan

**3/20**
**20/00386-1 Skjalasavnið -Leingja sáttmálan millum Tvøroyrar kommunu og Landsskjalsavnið, um skjalasavn á Tvøroyri**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 18.12.2020 | 1/20 |
| 2 Býráðið | 21.12.2020 | 3/20 |

**Kommunustjórin 07.12.2020**
Mælt verður til at leingja sáttmálan millum Tvøroyrar kommunu og Landsskjalsavnið, um skjalasavn á Tvøroyri, við tilknýttari gransking, sum gongur út 31. desember 2020. -Í hesum sambandi hevur umsitingin sent áheitan á Landsskjalasavnið um at leingja sáttmálan í enn eitt ár -fyri fyrst-, fram til 31. desember 2021.

Mælt verður eisini til, at Tvøroyrar kommuna heitir á Mentamálaráðið og Tjóðsavnið, um at skjalasavnið, sum nú hevur verði staðsett á Tvøroyri í 3 ár, og sum hevur prógva sítt virði, framyvir verður fíggja fult og heilt á Løgtingsfíggjarlóg. Hetta eigur at gerast við at økja um játtanina til Tjóðsavnið við serjáttan til raksturin av skjalasavninum á Tvøroyri. Hetta skal eisini síggjast í ljósinum av, at virksemið á skjalasavninum á Tvøroyri er økt munandi síðan hetta byrjaði okt. 2017, og nú stór verkætlan er fingin í lag at endurskapa pakkhús 18, verður virksemið hjá Skjalasavninum sannlíkt enn størri og tíddaningarmiklari. Her er talan um nógv savnindi, sum verða hildin at hava stóran granskingarligan ella mentanarligan týdning fyri alt Føroya land.

**Tvøroyrar kommuna hevur avsett til skjalasavnið 2021:**
§528, Tvøroyrar skjalasavn kr. 116.673,-, Rakstur
§528, Tvøroyrar søga kr. 211.000,-, Rakstur
§609, kr. 700.000,-, Løga

**Løgtingsfíggjarlóg 2020:**
***07. Skjalasøvn.*** *Víst verður til § 17 í lógini um skjalasøvn nr. 49, frá 28. apríl 1992, sum broytt við Ll. nr. 63 frá 30. apríl 2018. Játtanin er ætlað, sum ein royndarverkætlan í trý ár, at skipa eitt skjalasavn á Tvøroyri, fíggjað í felag av landinum, Tvøroyrar Býráð og privatum. Verkætlanin fer fram í neyvum samstarvi við Tjóðskjalasavnið. Játtanin í 2019 hækkaði 200 tús. kr., harav 50 tús. kr. vóru ætlaðar til nýggja skrásetingarskipan. Tá verkætlanarskeiðið er av, skal sambært sáttmálanum millum Landsskjalasavnið og Tvøroyrar Býrað gerast ein endalig meting av verkætlanini sum heild, m.a. fyri at vita um savnið skal halda fram, sum er, skal gerast um til skjalasavn, ella um annað skal gerast.*

**Løgtingsfíggjarlóg 2021:**
***07. Skjalasøvn.*** *Víst verður til § 17 í lógini um skjalasøvn nr. 49, frá 28. apríl 1992, sum broytt við Ll. nr. 63 frá 30. apríl 2018. Játtanin er ætlað sum stuðul til skjalasavn á Tvøroyri. Virksemið fer fram í neyvum samstarvi við Tjóðskjalasavnið. Játtanin í 2021 er hækkað við 300 tús. kr. Verkætlanin hevur verið skipað sum ein royndarverkætlan í trý ár, og í 2021 skal ein meting gerast av verkætlanini sum heild og um hvussu skjalasavnið kann halda fram*

***Løgtingslóg nr. 49 frá 28. apríl 1992 um skjalasøvn, sum broytt við løgtingslóg nr. 63 frá 30. apríl 2018***

*§ 17. 1) Landsskjalasavnið savnar, tekur ímóti og tryggjar privat savnindi, sum verða hildin at hava stóran granskingarligan ella mentanarligan týdning.*

*Stk. 2. 1) Slík privat savnindi, sum ikki eru avhend Landsskjalasavninum, eigur savnið at skráseta. Skrásetingin hevur við sær, at eigarin fær skyldu at boða Landsskjalasavninum frá, um eigaraviðurskiftini verða broytt, ella savnindini verða flutt.*

*Stk. 3. 1) Verða skrásett savnindi flutt av landinum, hevur eigarin skyldu at geva Landsskjalasavninum høvi at taka avrit av savnindunum, áðrenn tey verða útflutt.*

**Fíggjarnevndin 18. december 2020:**

Einmælt samtykt

**Býráðið 21. december 2020:**

Einmælt samtykt at fílgja tilmælið hjá Fíggjarnevndini at leingja sáttmálan við skjalasavnið.

**4/20**

**20/00389-2 Nýggjársnevndin -Umsókn um stuðul til Nýggjárshald 2020**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 18.12.2020 | 3/20 |
| 2 Býráðið | 21.12.2020 | 4/20 |

**Kommunustjórin 05.12.2020**
Til umrøðu er umsókn um stuðul frá nýggjársnevndini at skipa fyri nýggjárshaldið.

Tvøroyrar kommuna hevur í árini til 2017, veitt eina stuðulsupphædd, sum nýggjársnevndin sjálv hevur umsitið, og fyrireika nýggjárshald fyri. Í 2018 og 2019 fekk nýggjársnevndin eisini eint játtan á fyrireika nýggjárshald fyri, men hesi árini bleiv umsitingin hjá Tvøroyrar kommunu rættuliga nógv uppíblandað í smálutir í fyrireikingini av nýggjárshaldinum.

Kommunustjórin mælir til greiðari mannagongdir, har Nýggjárnevndin fær eina upphædd í stuðul, og at kommuna ikki eftirfylgjandi ber annan kostnað av nýggjárshaldinum, enn tað sum verður veitt í stuðul.

Stuðul árini:
- 2016, kr. 35.000,-
- 2017, kr. 35.000,-
- 2018, kr. 30.000,- + 18.000,- til keyp av bingju
- 2019, kr. 30.000,- + 30.000,- til keyp av bingju (Umframt hevur kommunan borði kostnaðin av olju, tilfari til faklar v.m. Kommunan var eisini kring fyrireiking av, tiltøkum kring nýggjarhaldið har kommunan skuldi bera kostnaðin av myndatøku kr. 5.000,-, Morgunmatur kr. 15.000,-, Suppa kr. 2.000,-. Grill kr. 1.000,-, keyp av meira olju kr. 3.970,- o.s.v.)

**Mentanarnevndin, 8. december 2020, pkt. 1:** Súsanna Bertholdsen skjýtur upp, at stuðulin frá Tvøroyrar kommunu til Nýggjársnevndina at fyriskipa nýggjárshaldið 2020/2021 verður kr. 50.000,-, og at Kommunan ikki ber annan kostnað av fyrireikingunum til nýggjárshaldið enn hetta sama. Anita Vibergsdóttir tekur undir við at kr. 50.000,- verða latnar í stuðul til nýggjársnevndina.

**Kommunustjórin 10.12.2020**
Rættleiðing til málslýsingina av kostnaðinum 2019. Skal vera: "Nýggjársnevndin og Seglloftið tóku stig til morgunmatin og bóru kostnaðin av hesum. Kommunan bar kostnaðin av olju, tilfari til faklar, upprudding, suppu og smyrjubreyð)

Mælt verður til at veita nýggjársnevndini eina stuðulsupphædd til fyriskipan av nýggjárs-haldinum, og at nýggjársnevndin fyrireikar øll viðurskiftir viðv. nýggjárshaldinum, samb. ásetingum og krøvum frá átaksleiðaranum.

**Fíggjarnevndin 18. december 2020:**
Anfinn Leo Hammerfoss mælir frá at nýggjársbál verður brent í Miðbýnum, hetta grunda á, at tætt er millum húsini, eins og vinnubygningar eru her, ið hava sjálvirkandi sløkkiútgerð. Partanir vóru samdur um, at best var um kommuna ikki luttekur í fyrireiking av nýggjárshaldinum, men at hetta verður avgreitt av nýggjársnevndini.
Einmælt samtykt at fylgja tilmælið hjá Mentanarnevndini og veita Nýggjársnevndini eina stuðuls upphædd á kr. 50.000,-

**Býráðið 21. december 2020:**
Einmælt samtykt at fylgja tilmælið hjá Fíggjarnevndini og veita Nýggjársnevndini eina stuðuls upphædd á kr. 50.000,-

**5/20**

**20/00390-2 Hornorkestrið -umsókn um fíggjarligan stuðul 2020**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 18.12.2020 | 5/20 |
| 2 Býráðið | 21.12.2020 | 5/20 |

**Kommunustjórin 08.10.2020**

**Málslýsing:**
Umsókn er móttikið frá Tvøroyrar Hornorkestur, ið søkir Tvøroyrar Býráð um 60.000,- kr. í stuðuli, til keyp av trimum kornettum

**Mentanarnevndin, 12. oktober 2020, pkt. 6:**
Málið verður flutt til næsta fund

**Mentanarnevndin, 16. november 2020, pkt. 1:**
Av tí at ongin fíggjarætlan er innsend verður málið flutt til næsta fund

**Mentanarnevndin, 8. december 2020, pkt. 3:**
Einmælt samtykt at veita Hornorkesrinum kr. 60.000,- í stuðul.

**Fíggjarnevndin 18. december 2020:**
Einmælt samtykt

Klik eller tryk her for at skrive tekst.

**Býráðið 21. december 2020:**
Einmælt samtykt at fylgja tilmælið hjá Fíggjarnevndini og stuðla Hornorkestrinum við kr. 60.000,-

## 6/20
## 20/00391-2 Susvim -umsókn um stuðul 2020

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 18.12.2020 | 6/20 |
| 2 Býráðið | 21.12.2020 | 6/20 |

**Kommunustjórin 05.12.2020**
Til viðgerðar er umsókn um stuðul, sum umsitingin hevur móttikið frá Susvim til virksemið hjá felagnum komandi ár.

**Mentanarnevndin, 8. december 2020, pkt. 6:**
Einmælt samtykt at veita kr. 30.000,- í stuðul.

**Fíggjarnevndin 18. december 2020:**
Einmælt samtykt

**Býráðið 21. december 2020:**
Einmælt samtykt at taka undir við Fíggjarnevndini og veita kr. 30.000,- í stuðul til Susvim.

**7/20**
**20/00392-1 Føroya Eftirskúli -leigusáttmálið av Sjógøtu 2, til undirvísing**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 18.12.2020 | 7/20 |
| 2 Býráðið | 21.12.2020 | 7/20 |

**Kommunustjórin 10. desember 2020.**
Umsitingin hevur móttikið umsókn frá skulastjóranum á Føroya Eftirskúla, um leingjan av leigusáttmálanum millum Tvøroyrar kommunu og Føroya Eftirskúla, av bygninginum á matr.nr 374, Sjógøta 2 á Tvøroyri, at brúk til undirvísing.

Galdandi sáttmálin, ið er undirskrivaður 19. august 2020, gongur frá 1. juni 2020 til 31. mai 2021, og søkt verður um at leingja henda fram til 31. mai 2023. -Samb. §3 í sáttmálanum kann leigarin søkja um leingjan av leigumálinum í upp til 36 mánaðir.

Mælt verður til at ganga umsóknini á møti, og at leigusáttmálin verður eins orðaður, við undantøku av §3, ið fær niðanfyri broyting:

> *§3 Longd leigumálsins: Leigumálið byrjar tann 1/6-2020, og er galdandi fram til 31/5-2023. Eigarin kann ikki siga leigusáttmálan upp fyrr enn 31/5-2023, og tá við freist uppá 3 mánaðir. Tó kann eigarin siga leigumálið upp við 1. mánaði freist um leigarin ikki lúkar krøvini í leigusáttmálanum. Leigarin kann siga sáttmálan upp við freist uppá 3 mánaðir, um viðurskiftini broytast somikið, at leigarin ikki longur hevur tørv á hølinum.*

**Fíggjarnevndin 18. december 2020:**
Einmælt samtykt

**Býráðið 21. december 2020:**
Einmælt samtykt

**8/20**
**20/00397-1 Talgildu Føroyar**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 21.12.2020 | 8/20 |

**Umsitingin:**
Fíggjarmálaráðið hevur gjørt verklagslóg um Talgildu Føroyar, sum er eitt samstarv millum land, kommunu og privatar fyritøkur. Hetta fyri, at hava eitt felags talgilt undirstøðukervið í Føroyum.. Kostnaðurin fyri hesa ætlan, ið gongur yvir 3 ár, er íalt 150 mió. kr., harav Landið fíggjar 60%, kommununar 17% og privata vinnan 23% av verkætlanini. Kommununar partur er 8,5 mió. kr árliga. í 3 ár, harav er mett, at Tvøroyrar kommuna skal gjalda 882 tús. kr. í eitt 3-ára tíðarskeið, sí viðfesta tilfar í málinum.

Kommunufelagið mælir til, at kommununar hvør í sínum lagi samskifta og gera avtalu við Fíggjarmálaráðið/Gjaldstovuna viðvíkjandi Talgildu Føroyum.

Umboð fyri Fíggjarmálaráðið/Gjaldstovuna vóru á kunningarfundi á Tvøroyri tann 21. mars í ár um verkætlanina, sí viðfesta notat frá fundinum.

**Býráðið, 8. maj 2017, pkt. 7:**
Býráðið heldur, at verkætlanin talgildu Føroyar er skilagóð, men ynskir fyrst at kanna eftir, hvussu støðan er hjá Kommunufelagnum hesum viðvíkjandi. Umsitingin kannar hetta, og málið verður lagt fyri Býráðið aftur á eyka-býráðsfundinum tann 18. mai.

**Fíggjarnevndin, 4. april 2018, pkt. 9:**
Fíggjarnevndin tók kunningina til eftirtektar, og ynskti at málið bleiv viðgjørt aftur í sambandi við býráðsfundin 7. mai ímeðan umsitingin kannar nøkur viðurskifti í málinum.

**Kommunustjórin 16.10.2020**
Stjórin í Talgildu Føroyar Nicolei Mohr Balle, hevur í telduposti hin 7. september 2020, vent seg til Tvøroyrar kommunu fyri at hoyra um Tvøroyrar kommuna er áhuga í byrja uppá samstarvið við Talgildu Føroyar.
Hann skrivar m.a. at:

- *"Talgildu Føroyar skuldi fíggjast av Landið, Kommunum og relevantum grunnum og fyritøkum. Hetta var grundarlagið undir verklagslógini um fígging av Talgildu Føroyum. Í hesum sambandi skuldi ein avtala verða gjørd við kommunurnar. Henda tilgongd var komin langt áleiðis við ársbyrjan 2018, men aðrir snávingarsteinar á leiðini høvdu við sær, at tað bert eydnaðist at gera avtalu við Tórshavnar kommuna"*
- *Í summar hava tríggjar aðrar kommunur, Nes-, Runavíkar- og Eysturkommuna, valt at gera avtalu við Fíggjarmálaráðið. Og nakrar afturat, hava boðað frá, at tær ynskja at luttaka í verkætlanini.*
- *Nú fokus er komið aftur á málið, venda okkum til tykkum, borgarstjórar í kommunum, sum enn ikki hava gjørt avtalu, fyri at hoyra um útlit eru til, at tit nú eru áhugaði í at fara inn í hetta samstarv.*

Kommunustjórin vil minna á skriv frá kommunufelagnum 4. januar 2019, har kommunufelagið upplýsur at: Á stýrisfundi í kommunufelagnum í dag samtykti stýrið, at heita á allar limakommunur um fyribils ikki at skriva undir samstarvs sáttmála við Talgildu Føroyar/ Fíggjarmálaráðið. Og mælt verður til at hoyra nærri um ætlanina, áðrenn Tvøroyrar kommunu ferð í samstarv við Talgildu Føroyar.

**Fíggjarnevndin, 21. oktober 2020, pkt. 6:**
Nevndin mælir til spyrja kommunufelagið, hvør støða felagið nú hevur til samstarvið við Talgildu Føroyum.

**Kommunustjórin 5.11.2020**
Kommunustjórin hevur samskift við kommunufelagið, fyri at hoyra nærri til støðuna hjá KF kring Talgildu Føroyar. Svari frá KF er nú:

- *Á aðalfundinum í ár var málið umrøtt. Tá boðaði onkur kommuna frá, at tey ikki longur ynskti at boykotta Talgidu Føroyar og fóru at skriva undir sáttmála eins og Havnar kommuna longu hevði gjørt.*
- *Síðani hava fleiri kommunur boðað frá, at tær hava ella fara at undirskriva samstarvsavtalu við Talgildu Føroyar.*
- *Kommunufelagið mælir ikki longur limakommununum frá at undirskriva avtalu við Talgildu Føroyar. Sum vit skilja, so hevur uml. helmingurin av kommununum longu undirskriva sáttmálan.*

Kommunusstjórin hevur eisini vent seg til stjóran fyri Talgildu Føroyar, Nicolai Mohr Balle fyri at fáa útgreina støðuna og møguleikan fyri, at Tvøroyrar kommuna verður partur av verkætlanini Talgildu Føroyar. *(Kostnaðurin at vera partur av Talgildu Føroyum er tengdur at antal borgarum í kommununi)*

- *Íløgu kostnaðurin fyri Tvøroyrar kommunu -at vera partur av Talgildu Føroyum- verður:* *<u>kr. 882.000,-</u>* *(Hetta kann gjaldast í einum ella í 2 ratum yvir 2 ár 2021 og 2022)*

Mælt verður til, at Tvøroyrar kommuna verður partur av Talgildu Føroyum pr. 1. Januar 2021.

**Fíggjarnevndin, 25. november 2020, pkt. 7:**
Málið verður beint í býráðið til støðutakan

**<u>Býráðið 21. december 2020:</u>**
Einmælt samtykt at, Tvøroyrar kommuna verður partur av Talgildu Føroyum 1. Januar 2021

**9/20**
**20/00402-7 Tryggingar -Samstarv við tryggingarmeklara-fyritøkuna Ravnur**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 18.12.2020 | 12/20 |
| 2 Býráðið | 21.12.2020 | 9/20 |

Málslýsing:

Tvøroyrar kommuna hevur áteknaðar tryggingar fyri árligt gjald í 2020 á kr. 485.399,-. Og talan er um krevjandi arbeiðsøkið, við nógvum ymiskum tryggingarskjølum.

Umsitingin hevur tí undirskriva samstarvssáttmála 18. Sep. 2020, við tryggingarmeklarafyritøkuna Ravnur, um at endurskoða allar tryggingar hjá Tvøroyrar kommunu, og fyri at gera útboðstilfar av tryggingum, ið verður í jan. 2022.

Uppgávan hjá Ravnur:

1. Tryggingargreining
2. Umboðan og fyrisiting av tryggingarviðurskiftum hjá Tvøroyrar kommunu
3. Útboða av tryggingum
4. Luttøku í innkeypsskipan hjá Ráðgevanum fyri arbeiðsskaðatrygging
5. Aðrar uppgávur eftir tørvi.

Ravnur hevði ætlan um at:

A. Samla tryggingar á færri tryggingarskjøl
B. Víðka um fulnaðin á bygnings- og leysafætryggingum við m.a. raðskaðafulnaði
C. Keypa produktábyrgdartrygging
D. Tryggja øll akfør líka
E. Keypa arbeiðsskaðatrygging gjøgnum Ravnur Innkeypsskipan
F. Hækka sjálvsábyrgd til 10.000 kr. (akfør) og 50.000 kr. (bygning, leysafæ og ábyrgd)

Soleiðis varð úrslitið hjá Ravnur

A. Tað eydnaðist ikki at samla bygnings- og leysafætryggingar á færri skjøl
B. Fulnaðurin 2021 verður tann sami sum í 2020
C. Betri hevur bjóða samansetta vinnu- og produktábyrgdartrygging fyri kommununa undir einum
a. Tryggingarupphædd á 15,0 mió. kr. (persón- og tingskaði)
b. I/K-skaði og -tap
D. Øll akfør verða tryggjað líka
E. Arbeiðsskaðatrygging keypt gjøgnum Ravnur Innkeypsskipan
F. Sjálvsábyrgdin verður hækkað

Ravnur hevur samrátt seg til úrslit, har Tvøroyrar kommuna sparir upp til 22% í tryggingargjaldinum. Og kostnaðurin fyri Tvøroyrar kommunu at hava samstarvsavtaluna við Ravnur er áleið tað sama sum sparingin hevur verði.

Fyrimunurin við samstarvinum er ráðgeving, og samstarv, meðan sparingin í tryggingarkostnaði fyri Tvøroyrar kommunu ikki sæst fyrr enn næsta útboð í jan. 2022.

**Til støðutakan:**

Hvørt Tvøroyrar kommuna framhaldandi skal samstarva við Ravnur, sum leggur upp til enn meira sparing, serliga orsakað av, at fleiri kommunur eru í samstarvinum við Ravnur
Metingin hjá Ravnur er ein sparing á upp til 30% at kostnaðurin fyri hvørja kommunu sær av tryggingum eftir næsta útboð, sum verður seinni í okt. 2021.

**Fíggjarnevndin 18. december 2020:**
Einmælt samtykt at taka av uppskotið nr. 2, har samla tryggingargjaldið verður kr. 384.108,- samb. Tryggingarmeklarafyritøkuni Ravnur. Hvørt samstarvið við felagið Ravnur skal halda áfram, verður støða tikin til á einum seinni fundi.

**Býráðið 21. december 2020:**
Einmælt samtykt at taka undir við Fíggjarnevndini.

**10/20**
**20/00399-1 Útboð av rakstri av kantinuni í ítróttarhøllini**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 21.12.2020 | 10/20 |

**Málslýsing:**

**Kommunustjórin 11.05.2020**
Anita Farstad hevur við Tvøroyrar kommuna leigusáttmála av kantinuni í Trongisvágs Skúla, sum gongur út 30. juni 2020, og hevur Anita Farstad sent umsitingin umsókn, um leingjan av leigusáttmálanum við 5 árum fram til 30 juni 2025.

**Mentanarnevndin, 11. maj 2020, pkt. 4:**
Einmælt samtykt at raksturin av kantinuni verður boðin út av nýggjum frá 30.06.2020 í eitt tíðarskeið á 5 ár. Og at verandi sáttmálin verður endurskoðaður, soleiðis at kantina er opin tá høllin er opin, og at skúlanæmingar fáa atgongd til kantinua í skúlatíð. Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Fíggjarnevndin, 20. maj 2020, pkt. 11:**
Anita Farstad var boðin at luttaka á fundinum fyri at greið frá um gongdina og raksturin av kantinuni. Einmælt samtykt at beina málið aftur í mentanarnevndina til at endurskoða verandi sáttmálan, og fáa útgreina hvønn tørv og ynskir eru fyri at hava kantinuna opna.

**Kommunustjórin 25. maj 2020.**
Sum áður fráboðað av kommunustjóranum 11.05.2020, hevur Anita Farstad og Tvøroyrar kommuna leigusáttmála um raksturin av kantinuni í Trongisvágs Skúla, sum gongur út 30. juni 2020. Anita Farstad hevur sent umsitingin umsókn, um leingjan av leigusáttmálanum við 5 árum fram til 30 juni 2025.
Ásett er í verandi sáttmálanum §4. "Sáttmálin um raksturin er galdandi í tíðarskeiðinum 01.07.2015-30.06.2020 við møguleika fyri leingjan. Partarnir kunna í seinasta lagi 6.mnd áðrenn hesin sáttmáli gongur út, semjast um at leingjan". Anita Farstad er boðin á fundin í mentanarnevndini mánadagin 8. juni, kl. 13:00, at greiða frá um gongdina og raksturin av kantinuni.

**Mentanarnevndin, 8. juni 2020, pkt. 1:**
Anita Vibergsdóttir skjótur upp at leingja sáttmálan í 12.mnd. meðan Súsanna Bertholdsen og Bjarni Hammer mæla til at leingja sáttmálan í 6. mnd.
Samtykt at leigusáttmálin verður longdur í 6. mnd., og umsitingin brúkar hesa tíðina til at gera klárt til at bjóða út av nýggjum. Málið verður beint í fíggjarnevndina.

**Kommunustjórin 12.06.2020**
Til viðgerðar er tilmælið frá Mentanarnevndini at leingja verandi leigusáttmálan av rakstrinum av kantinuni í Trongisvágs Skúla millum Tvøroyrar kommunu og Anitu Farstad, sum gongur út 30. juni 2020.

**Fíggjarnevndin, 15. juni 2020, pkt. 7:**
Kristin Michelsen ynskir at atkvøtt verður um bæði tilmælini hjá Mentanarnevndini

1. at leingja sáttmálan í 12 mnd.: Kristin Michelsen atkvøður fyri, Bjarni Hammer og Kristina Roest atkvøða ímóti. Uppskotið fallið
2. at leingja sáttmálan í 6.mnd.: Bjarni Hammer og Kristina Roest atkvøða fyri, Kristin Michelsen atkvøddi ímóti. Uppskotið samtykt

**Kommunustjórin 17.09.2020**
Forkv. í mentanarnevndini ynskir at fáa status á støðuni at bjóða raksturin av kantinuni í Ítróttar- og skúladeplinum í Trongisvági. Uppskot til gjørt til útboðstilfari, og støða skal takast til tíðir kantinan hevur opið.

**Mentanarnevndin, 21. september 2020, pkt. 7:**
Flutt til næsta fund

**Mentanarnevndin, 12. oktober 2020, pkt. 10:**
Meirilutin í Mentanarnevndini Súsanna Bertholdsen og Bjarni Hammer ynskir at orðingin í punkt. 3. verður broytt og orðað.

- ***Upplatingartíðir:*** *Ynskiligt er, at kantinan er opin í sambandi við venjingar gerðandiskvøld, kappingar og tiltøk í vikuskiftunum. Loyvishavarin skal samstarva við húsavørðin í Ítróttarhøllini um virksemið og um upplatingartíðirnar. Umframt at útboðið av mati er av góðari dygd, og at møguleikið er fyri at fáa heilsugóðan mat.*

**Fíggjarnevndin, 21. oktober 2020, pkt. 9:**
Nevndin mælir til, at umsitingin tillagar útboðstilfarið soleiðis at tað verður greiðari.
Skúlakøkurin skal m.a. nevnast í útboðstilfarinum.

Málið verður beint í býráðið.

**Býráðið 21. december 2020:**
Einmælt samtykt at bjóða raksturin út samb. Tilmælið hjá Kommunstjóranum, og at freistin at søkja verður 7. januar 2021.

**11/20**
**20/00407-2 2. viðgerð -Eykajáttanir fyri ár 2020**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 21.12.2020 | 11/20 |

## Málsfrágreiðing

**Kommunustjórin 23.11.2020**
Fíggjardeildin er ikki liðug við uppgerðini av eykajáttan og flytan millum konto fyri 2020.

**Fíggjarnevndin, 25. november 2020, pkt. 10:**
Málið verður beint í býráðið

**Kommunustjórin 27.11.2020**
Fíggaræltanin fyri 2020 framroknað vísir avlop á kr. 16.108.577,- fyri rakstur og íløgur.
Meirnýtsla er tó á nøkrum greinum innan:

- §1 Kommunalafyrisitingin kr. -28.039,-
- §2 Almanna og heilsumál kr. -78.058,-
- §3 Børn og ung kr. -274.882,-
- §5 Mentan og frítið kr. -148.555,-
- §6 Teknisk mál kr. -1.240.845,-
- §7 Umhvørvi kr. -678.089,-

**Samla: kr. -2.448.470,-**

Mælt verður til at fíggja meirnýtsluna við flytingum innan hvørja grein sær.

**Avgerð**
Einmælt samtykt at fíggja meirnýtsluna við flytingum millum konto innan hvørja grein sær

**Kommunustjórin 21.12.2020**
Fíggjardeildin er pr. 21.12.2020 liðug við uppgerðini fyri eykajáttanum og flytingum millum rakstrar- og íløgukonti fyri fíggjarárið 2020.

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| §1 | Avlop á | | 725.000,00 | |
| | 112 Val og valnevndir | Eykajáttan | | 5.000,00 |
| | 114 Fyrisiting | Eykajáttan | | 70.000,00 |
| | 128 Trivnaðardeild | Eykajáttan | | 10.000,00 |
| | | | | 85.000,00 |
| | 118 Tekniska deild | Fígging | | -85.000,00 |
| | | | | 0 |
| § 2 | Avlop á | | 590.000,00 | |
| | 224 Frípláss | Eykajáttan | | 77.000,00 |
| | 210 Kommunulæknar | Fígging | | -77.000,00 |
| | | | | 0 |
| § 3 | Avlop á | | 2.900.000,00 | |
| | 302 Dagrøkt | Eykajáttan | | 300.000,00 |
| | 316 Spælipláss | Eykajáttan | | 25.000,00 |
| | 311 Barnagarður (løga) | Eykajáttan | | 3.000,00 |
| | | | | 328.000,00 |
| | 310 Barnagarður | Fígging | | -328.000,00 |
| | | | | 0 |
| § 5 | Avlop á | | 1.880.000,00 | |
| | 510 Musikkskúlin | Eykajáttan | | 90.000,00 |
| | 518 Aðrar útreiðslur | Eykajáttan | | 5.000,00 |
| | 530 Svimjing | Eykajáttan | | 50.000,00 |
| | | | | 145.000,00 |
| 524b | Tilboð Ung (virðiskort) | Fígging | | -145.000,00 |
| | | | | 0 |
| § 6 | Avlop á | | 7.300.000,00 | |
| | 618 Kirkjugarð | Eykajáttan | | 12.000,00 |
| | 624 Vegir | Eykajáttan | | 75.000,00 |
| | 626 Gøtuljós | Eykajáttan | | 150.000,00 |
| | 632 Viðalundir | Eykajáttan | | 55.000,00 |
| | 621 Vatnverkið (løga) | Eykajáttan | | 200.000,00 |
| | 627 Gøtuljós (løga) | Eykajáttan | | 15.000,00 |
| | 629 Maskinur & Bilar (løga) | Eykajáttan | | 300.000,00 |
| | | | | 807.000,00 |
| | 614 Friðkan | Fígging | | -55.000,00 |
| | 620 Vatn | Fígging | | -500.000,00 |
| | 619 Kirkjugarð (løga) | Fígging | | -12.000,00 |
| | 625 Vegir (løga) | Fígging | | -240.000,00 |
| | | | | 0 |
| § 7 | Avlop á | | 2.300.000,00 | |
| | 710 Bingjuplássið | Eykajáttan | | 75.000,00 |
| | 715 Sløkkiliðið (løga) | Eykajáttan | | 450.000,00 |
| | 719 Tv.Havn (løga) | Eykajáttan | | 525.000,00 |
| | | | | 1.050.000,00 |
| | 714 Sløkkiliðið | Fígging | | -450.000,00 |
| | 718 Tv.Havn | Fígging | | -525.000,00 |
| | 711 Bingjuplássið (løga) | Fígging | | -75.000,00 |
| | | | | 0 |
| | Avlop í alt | | 15.695.000,00 | |

**Býráðið 21. december 2020:**
Einmælt samtykt við 2. viðgerð

**12/20**
**20/00411-3 2. viðgerð av eykajáttan -Arbeiðsbilur til Teknisku deild**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
| --- | --- | --- |
| 1 Býráðið | 21.12.2020 | 12/20 |

**Tekniskur leiðari 10-09-2020:**
Fleiri fólk eru komin til deildina og hevur verið vanligt at teir tímaløntu hava brúkt privatbilarnar, men er hetta ikki møguligt longur. Formaðurin í deildini hevur tí vent seg til tekniska leiðaran um at fáa fleiri bilar til røttu endamálini. Eisini er so at nakrir av bilinum eru sera gamlir og kunnu ikki gerast aftur.

a) Tí verður mælt til at keypa bilar til deildina sum nøkta rætta tørvin. At byrjað við er brúk fyri einum 4x4 lastbili, líknandi sum tann grái sum JMB brúkar, tó uttan vippulast.

b) Seinri er brúk fyri at skifta bláa lastbilin út, tí hesin er í so ringum standi, líknandi bilur skal keypast og samstarvi við kaifútar heldur fram sum nú.

**. 19. oktober 2020, pkt. 2:**
At 4x4 bilur verður keyptur nú og leasaður. Samlaður prísur 450.000,-
Til endamálið verður skotið upp, at flyta upphæddina frá "rakstrarjáttanini til kloakk 622" til "løgujáttanina fyri maskinur og bilur".

**Tekniska nevnd, 19. oktober 2020, pkt. 2:**
Nevndin tekur undir við tilmælinum frá Teknisku deild, og umsitingin arbeiðir víðari við málinum.

**Kommunustjórin 23.11.2020**
Mælt verður til at keypa ein arbeiðsbil til Tekniska deild, og at hesin verður fíggjaður av fytingum millum játtan til Teknisk mál grein §629 "Maskinur og bilar" og §623 "Bygging og løguframleiðsla"

**Fíggjarnevndin, 25. november 2020, pkt. 8:**
Einmælt samtykt at fylgja tilmælið hjá kommunustjóranum, og heitta á tekniskaleiðaran at bíleggja bilin beinanvegin.

**Avgerð**
Einmælt samtykt

**Býráðið 21. december 2020:**
Einmælt samtykt at keypa bilin og at hesin verður fíggjaður §623

13/20

**20/00398-1 Ásetan av býráðsfundum 2021**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 21.12.2020 | 13/20 |

**Kommunustjórin 16.12.2020**
Mælt verður til at býráðsfundir 2021 vera hildnir sambart niðanfyri nevndu dagfestingum.

# TVØROYRAR BÝRÁÐ BÝRÁÐSFUNDIR 2021

| JANUAR | FEBRUAR | MARS | APRÍL | MAI | JUNI |
|---|---|---|---|---|---|
| 28 | 25 | 25 | 29 | 27 | 17 |

| JULI | AUGUST | SEPTEMBER | OKTOBER | NOVEMBER | DESEMBER |
|---|---|---|---|---|---|
| Summarfri | 26 | 30 | 28 | 25 | 16 |

## Býráðsfundir

Býráðsfundur er vanliga eina ferð um mánaðin, -seinasta Tórsdag í hvørjum mánaði-. Allir býráðsfundir vera hildnir á Kommunuskrivstovuni, á Tvøravegi 37, í býráðssalinum kl. 17.00.

Mál, ið ynskjast viðgjørd á býráðsfundi, mega verða býráðnum í hendi í seinasta lagi hin 5 í mánaðinum, sum býráðsfundurin er.

Umframt regluligu fundirnar heldur býráðið eisini av og á eykafundir, tá ið støða skal verða tikin til týdningarmikil mál, sum hava skund.

Í juli og ½ august heldur býráðið summarfrí.

## Fíggjarnevndin

Fíggjarnevndin hevur vanliga fund, vikuna fyri sum býráðsfundur er.
Mál, ið borgarar ynskja viðgjørd í Fíggjarnevndini, skulu verða kommununi í hendi í seinasta lagi hin 5. í mánaðinum.

## Sosialanevnd

Sosialanevndin hevur vanliga fund, týsdag vikuna fyri fíggjarnevndarfund.

vikuna fyri sum fíggjarnevndar fundur er.

Mál, ið ynskjast viðgjørd í Sosialunevnd, skulu verða kommununi í hendi í seinasta lagi hin 5. í mánaðinum.

## Mentanarnevndin

Mentanarnevndin hevur vanliga fund, týsdag vikuna fyri fíggjarnevndarfund.

Mál, ið ynskjast viðgjørd í Mentanarnevndini, skulu verða kommununi í hendi í seinasta lagi hin 5. í mánaðinum.

## Tekniska nevnd

Tekniska nevnd hevur vanliga fund, mánadag vikuna fyri fíggjarnevndarfund.

Mál, ið ynskjast viðgjørd í Teknisku nevnd, skulu verða kommununi í hendi í seinasta lagi hin 5. í mánaðinum.

## Trivnaðar- og umhvørvisnevndin

Trivnaðar- og umhvørvisnevndin hevur vanliga fund, týsdag vikuna fyri sum fíggjarnevndar fundur er.

Mál, ið ynskjast viðgjørd í Trivnar- og umhvørvisnevndini, skulu verða kommununi í hendi í seinasta lagi hin 5. í mánaðinum.

## Vinnu- og havnanevndin

Vinnu- og havnanevndin hevur vanliga fund, hvønn mánadag vikuna fyri sum fíggjarnevndar fundur er.

Mál, ið ynskjast viðgjørd í Vinnu- og havnarnevndini, skulu verða kommununi í hendi í seinasta lagi hin 5. í mánaðinum.

**Býráðið 21. december 2020:**

Einmælt samtykt

TVØROYRAR KOMMUNA

**14/20**
**20/00172-8 Drelnes -skaði á havnarlagið 2. viðgerð av eykajáttan**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 21.12.2020 | 14/20 |

**Málslýsing:**

**Skaðin skal gjaldast av tryggingarfelagnum Skuld, sum hevur veitt eina trygd uppá 2,9 mill. kr. Kommunan skal tó gera arbeiðini fyrst og leggja út, og hareftir senda kravið til Skuld.**

**Vinnu- og havnanevnd, 17. november 2020, pkt. 2:**
Nevndin er kunnað, og málið verður beint í fíggjanevndina.

**Kommunustjórin 23.11.2020**
Mælt verður til at kommunan garanterar fyri kostnaðinum av arbeiðinum yvir fyri arbeiðstakarinum, samb. tilboð, og eftirfylgjandi framsetur kommunan tilsvarandi krav ímóti tryggjingarfelagnum Skuld, tá arbeiði er liðugt.

**Fíggjarnevndin, 25. november 2020, pkt. 5:**
Einmælt samtykt at fylgja tilmælið kommunustjóranum. -málið verður beint í býráðið

**Býráðið, 30. november 2020, pkt. 8:**
Einmælt samtykt

**Kommunustjórin 10.12.2020**
2. viðgerð av játtan til garanti av innistandandi gjaldføri fyri arbeiðstøku av skaða á havnarlagið á Drelnes vegna tryggingarfelagið Skuld, sum endurrindar Tvøroyrar kommunu fyri umvælingina, tá henda er endaliga liðugt afturgjørd.

**Býráðið 21. december 2020:**
Einmælt samtykt við 2. viðgerð

**15/20**
**20/00413-1 Mýrifipan -Keypa av innbúgv**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 21.12.2020 | 15/20 |

**Málslýsing:**

**Kommunustjórin 05.12.2020**
Til umrøðu er keyp av innbúgv til gamla partin av barnagarðinum

**Sosiala nevnd, 8. december 2020, pkt. 2:**
Kári Petersen, leiðari í barnagarðinum Mýrifípuni var á fundinum og greiddi frá ætlanini. Einmælt samtykt at keypa innbúgv til barnagarðin, og at eykajáttan verður veitt til hetta. -Málið verður beint í býráðið

**Kommunustjórin 15.12.2020**
Mælt verður til at keypa innbúgv til gamla barnagarðin, samb. fyriliggjandi tilboð kr. 399.380,- ex. mvg, og at hetta verður fíggja sum eykajáttan, við at flyta kostnaðin av §311 íløgukonti, ið var avsett til umbygging av gamla barnagarðinum 2020.

**Býráðið 21. december 2020:**
Einmælt samatykt

**16/20**

**20/00414-1 Føroysk teldutala -stuðul til forritið "føroyski talukennarin"**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 21.12.2020 | 16/20 |

**Kommunustjórin 15.12.2020**

Kommunufelagið hevur sent øllum limakommununum teldupost vegna grunnin "føroysk teldutala", ið søkir um stuðul frá kommununum til at menna telduforrit sum lesur ljóðbylgjur og ger tær um til tekst.

*Til limakommunurnar*
*Kommunufelagið hevur fingið umsókn um stuðul til verkætlanina "føroyski talukennarin".*
*Endamálið við verkætlanini er at menna eitt forrit, sum lesur ljóðbylgjur og ger tær um til tekst, og á hendan hátt fáa teldur og telefonir til at kunna skriva talað føroyskt.*
*Talukennarin verður øllum eitt hent hjálparamboð, men serliga borgarum sum t.d. hava ADHD, sjóntrupulleikar, orðblindni, risthendni ella einhvørja aðra nevrologiska ella kropsliga avbjóðing fáa við hesum hjálp til at skriva.*
*Tað er Grunnurin føroysk teldutala sum stendur aftan fyri verkætlanina.*
*Í tilfarinum viðfest hesum telduposti, verður greitt nærri frá verkætlanini.*
*Grunnurin søkir um 1 mió. kr. í stuðli frá kommununum til at gera verkætlanina lidna.*
*Stýri felagsins viðgjørdi umsóknina á fundi fríggjadagin 20 nov. Stýrið mælir til at allar kommunur stuðla verkætlanini, men endaliga avgerðin liggur sjálvsagt hjá einstøku kommununum.*
***Luturin hjá einstøku kommununi verður góðar 19 kr. pr. borgara.** Samlaða upphæddin fyri einstøku kommununa sæst í fylgiskjali nr. 5.*

*Við vón um vælvild.*
*Vegna Kommunufelagið, Eyðun Christiansen, Stjóri*

**Stuðulsupphæddin søkt verður um frá Tvøroyrar kommunu er kr. 32.864,-**

**Býráðið 21. december 2020:**
Einmælt samtykt at útseta málið til seinni fund

Til kunningar

**1/20**

**20/00405-2 Skattainntøka 2020 -jan.-nov.**

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 18.12.2020 | 2/20 |
| 2 Býráðið | 21.12.2020 | 1/20 |

Kunning um skattainntøkur 2020

| Kommuna: | 2019 | 2020 | Munur kr. | Munur % |
|---|---|---|---|---|
| **Fyribilsskattur til kommunurnar í november:** | | | | |
| Kommuna: | 2019 | 2020 | Munur kr. | Munur % |
| Fugloyar | 195.603 | 206.499 | 10896 | 5,57 |
| Viðareiðis | 1.316.429 | 1.145.540 | -170889 | -12,98 |
| Hvannasunds | 1.413.407 | 1.235.450 | -177957 | -12,59 |
| Klaksvíkar | 18.728.113 | 17.697.663 | -1030450 | -5,50 |
| Kunoyar | 692.670 | 500.529 | -192141 | -27,74 |
| Fuglafjarðar | 5.739.373 | 5.644.076 | -95297 | -1,66 |
| Eystur | 8.633.106 | 8.422.279 | -210827 | -2,44 |
| Nes | 4.360.507 | 4.159.137 | -201370 | -4,62 |
| Runavíkar | 14.357.718 | 14.368.844 | 11126 | 0,08 |
| Sjóvar | 3.495.869 | 3.540.539 | 44670 | 1,28 |
| Eiðis | 2.221.520 | 2.222.368 | 848 | 0,04 |
| Sunda | 6.330.754 | 5.913.367 | -417387 | -6,59 |
| Kvívíkar | 2.082.056 | 1.938.615 | -143441 | -6,89 |
| Vestmanna | 3.998.154 | 4.064.026 | 65872 | 1,65 |
| Vága | 6.554.616 | 6.947.632 | 393016 | 6,00 |
| Sørvágs | 4.094.809 | 4.080.532 | -14277 | -0,35 |
| Sands | 1.453.267 | 1.461.086 | 7819 | 0,54 |
| Skopunar | 1.260.049 | 1.241.648 | -18401 | -1,46 |
| Skálavíkar | 430.659 | 406.511 | -24148 | -5,61 |
| Húsavíkar | 268.143 | 308.290 | 40147 | 14,97 |
| Skúvoyar | 90.077 | 100.575 | 10498 | 11,65 |
| Hvalbiar | 2.199.851 | 1.964.216 | -235635 | -10,71 |
| Tvøroyrar | 5.130.753 | 5.242.232 | 111479 | 2,17 |
| Fámjins | 212.702 | 258.736 | 46034 | 21,64 |
| Hovs | 240.599 | 260.179 | 19580 | 8,14 |
| Porkeris | 792.324 | 840.358 | 48034 | 6,06 |
| Vágs | 4.084.570 | 3.759.809 | -324761 | -7,95 |
| Sumbiar | 886.320 | 884.283 | -2037 | -0,23 |
| Tórshavnar | 68.231.915 | 71.696.683 | 3464768 | 5,08 |
| | 169.495.933 | 170.511.702 | 1015769 | 0,60 |
| | | | | |
| Landsskattur | 144.380.002 | 141.833.252 | -2546750 | -1,76 |
| Kirkjuskattur | 5.229.158 | 5.493.740 | 264582 | 5,06 |
| Eftirlønarsk. | 33.934.544 | 36.684.567 | 2750023 | 8,10 |

| Kommuna: | 2019 | 2020 | Munur kr. | Munur % |
|---|---|---|---|---|
| **Fyribilsskattur fyri januar og november - samanlagt:** | | | | |
| Kommuna: | 2019 | 2020 | Munur kr. | Munur % |
| Fugloyar | 2.031.663 | 1.897.429 | -134234 | -6,61 |
| Viðareiðis | 13.741.487 | 12.550.404 | -1191083 | -8,67 |
| Hvannasunds | 14.526.101 | 14.495.127 | -30974 | -0,21 |
| Klaksvíkar | 195.127.714 | 201.291.868 | 6164154 | 3,16 |
| Kunoyar | 5.369.821 | 5.038.453 | -331368 | -6,17 |
| Fuglafjarðar | 61.738.086 | 63.330.709 | 1592623 | 2,58 |
| Eystur | 81.578.162 | 86.117.475 | 4539313 | 5,56 |
| Nes | 46.559.763 | 47.934.341 | 1374578 | 2,95 |
| Runavíkar | 154.354.697 | 160.480.361 | 6125664 | 3,97 |
| Sjóvar | 37.567.947 | 39.859.231 | 2291284 | 6,10 |
| Eiðis | 23.673.748 | 24.336.572 | 662824 | 2,80 |
| Sunda | 68.333.792 | 67.356.681 | -977111 | -1,43 |
| Kvívíkar | 21.905.976 | 22.471.581 | 565605 | 2,58 |
| Vestmanna | 45.319.041 | 44.783.546 | -535495 | -1,18 |
| Vága | 74.124.863 | 76.147.673 | 2022810 | 2,73 |
| Sørvágs | 44.951.365 | 44.361.220 | -590145 | -1,31 |
| Sands | 16.194.587 | 16.394.741 | 200154 | 1,24 |
| Skopunar | 14.528.346 | 15.054.408 | 526062 | 3,62 |
| Skálavíkar | 5.151.451 | 4.961.668 | -189783 | -3,68 |
| Húsavíkar | 3.107.413 | 3.373.079 | 265666 | 8,55 |
| Skúvoyar | 1.093.216 | 1.121.582 | 28366 | 2,59 |
| Hvalbiar | 21.477.423 | 22.389.210 | 911787 | 4,25 |
| Tvøroyrar | 56.067.317 | 56.980.400 | 913083 | 1,63 |
| Fámjins | 2.281.291 | 2.433.396 | 152105 | 6,67 |
| Hovs | 2.891.227 | 2.912.841 | 21614 | 0,75 |
| Porkeris | 9.355.674 | 9.748.333 | 392659 | 4,20 |
| Vágs | 42.840.543 | 42.436.917 | -403626 | -0,94 |
| Sumbiar | 9.368.976 | 9.206.452 | -162524 | -1,73 |
| Tórshavnar | 751.487.644 | 786.424.498 | 34936854 | 4,65 |
| | 1.826.749.334 | 1.885.890.196 | 59140862 | 3,24 |
| | | | | |
| Landsskattur | 1.525.437.127 | 1.586.372.441 | 60935314 | 3,99 |
| Kirkjuskattur | 56.545.815 | 60.094.367 | 3548552 | 6,28 |
| Eftirlønarsk. | 363.933.491 | 390.003.517 | 26070027 | 7,16 |

**Fíggjarnevndin 18. december 2020:**

Málið var umrøtt og kunnað

**Býráðið 21. december 2020:**

Málið var umrøtt og kunnað

TVØROYRAR KOMMUNA

**2/20**

## 20/00385-3 Fíggjarætlan fyri Bú- og Heimatænastuna í Suðuroy - fíggjarárið 2021

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Fíggjarnevndin | 18.12.2020 | 1/20 |
| 2 Býráðið | 21.12.2020 | 2/20 |

**Kommunustjórin 11. desember 2020**

Stýrið fyri Bú- og heimatænastuna hevur á stýrisfundi 10. desember.2020, viðgjørt og samtykt fíggjarætlanina fyri BHS av nýggjum, eftir at tað kom fram, at metingin av afturberingini til kommunurnar er munandi minni enn ásett var í fyrru fíggjarætlanini fyri BHS, sum var sent kommununum til viðgerðar hin 30. september 2020. (Afturberingin hjá Tvøroyrar kommunu er nú kr. 21,7 mió., svarandi til 35,5% av rakstrinum av BHS, við 336 persónum fyltir +67, og ikki kr. 22,3 mió.)

| Rakstrarstað | BHS- FÆ2021 9.sep. | BHS- FÆ2021 10.des. | Rokniskapur 2019 |
|---|---|---|---|
| Eldrasambýlið í Hvalba: | 4.990.624 | 4.990.624 | 7.465.969 (Íroknað útiøkið Hvalba, Sandvík 100% leiðaraløn) |
| Eldrasambýlið í Vági: | 5.713.080 | 5.713.080 | 6.247.600 (Íroknað 100% leiðaraløn) |
| Hamragarður: | 14.302.768 | 14.302.768 | 15.512.319 (Íroknað fysio- og ergoterapi) |
| Suðuroyar Ellis- og Røktarheim: | 15.335.628 | 15.335.628 | 16.734.260 |
| Útiøkið suður: | 3.553.988 | 3.553.988 | 2.968.817 (Leiðaraløn ikki íroknað) |
| Útiøkið norður: | 5.663.344 | 5.663.344 | 4.308.547 (Útiøkið Hvalba & Sandvík ikki íroknað) |
| Dagtilhaldið á Hamragarði: | 786.240 | 786.240 | 737.139 |
| Sjúkrarøktarfrøðingar: | 3.168.376 | 3.168.376 | 3.559.785 |
| Fysio- og ergoterapi: | 1.862.200 | 1.862.200 | 791.982 (Størvini ikki sett í stórar partar av 2018) |
| Fyrisiting: | 2.306.600 | 2.306.600 | 2.344.658 |
| Ansingarsamsýning: | 1.500.000 | 1.500.000 | 1.367.473 |
| Cosmic: | 0 | 0 | 0 |
| Leigugjald bygningar: | 4.000.000 | 4.000.000 | 5.904.929 |
| Bussur: | 185.000 | 185.000 | 0 |
| Søla av vørum og tænastum: | 5.100.000 | 5.100.000 | 5.371.190 |
| **TILSAMANS:** | **58.267.848** | **58.267.848** | **62.572.288** |
| Sparing í mun til árið 2020 | - 3.505.152 | - 2.952.152 | |
| | Fyrra uppskotið ikki galdandi | **Seinna uppskot Galdandi** | |

Tvøroyrar býráð hevur einmælt samtykt á Býráðsfundi hin 30. nov., at afturberingin hjá Tvøroyrar kommuna fer í samstarvið, treyta av at allar kommunurnar taka undir við hesari ætlanini, og gera hetta sama við teirra afturbering. Eftir at Stýri fyri BHS á stýrisfundin 10. des. hevur samtykt fíggjarætlanin fyri BHS 2021, við afturbering til kommunurnar:

| Fólkatal - 67 ár og eldri pr. 1. des. 2020 | Tils. | 67+ ár | Lutfall | BHS býtt á kommunur | Seinna inntøkumeting 2021 frá FMR |
|---|---|---|---|---|---|
| Hvalbiar kommuna | 679 | 135 | 14,3% | 8.315.179 | 8.292.000 |
| Tvøroyrar kommuna | 1.714 | 336 | 35,5% | 20.695.557 | 21.717.000 |
| Fámjins kommuna | 83 | 29 | 3,1% | 1.786.224 | 1.398.000 |
| Hovs kommuna | 99 | 23 | 2,4% | 1.416.660 | 1.227.000 |
| Porkeris kommuna | 318 | 74 | 7,8% | 4.557.950 | 4.284.000 |
| Vágs kommuna | 1.352 | 274 | 29,0% | 16.876.734 | 17.635.000 |
| Sumbiar kommuna | 358 | 75 | 7,9% | 4.619.544 | 4.464.000 |
| Tilsamans | 4.603 | 946 | 100,0% | 58.267.848 | 59.017.000 |

Fíggjarætlanin fyri BHS 2021, javnvigar sostatt við kr. 59,0 mió., og gevur samla rakstaravlop uppá kr. 749.152,- (Treyta av at øll afturberingin fer í samstarvið)

- Tvøroyrar kommuna, kr. 1.021.443,-
- Vágs Kommuna, kr. 758.266,-

- Hvalbiar kommuna, kr. -23.179,-
- Sumbiar kommuna, kr. -155.544,-
- Hovs kommuna, kr. -189.660,-
- Porkeris kommuna, kr. -273.950,-
- Fámjins kommuna, kr. -388.224,-

Um tær kommunurnar, sum hava avlop (Vág og Tvøroyri) ikki lata avlopið fara í samstarvið, írestar kr. -1.030.557,- í rakstrinum fyri Bú- og Heimatænastuna 2021. Fíggjarætlanin fyri BHS 2021, varð samtykt av stýrinum, við undantakið av umboðinum hjá Fámjin, Hovi og borgarstjórin á Tvøroyri, sum atkvøddu ímóti. -Eftirfylgjandi hava borgarstjóranir í Sumba og Hvalba gjørt vart við, at Bygdaráðini har hava samtykt, ikki at gjalda meira í samstarvið enn tað, ið fæst aftur í afturbering.

**Fíggjarnevndin 18. december 2020:**
Málið var umrøtt og kunna.

**Býráðið 21. december 2020:**
Málið var umrøtt og kunna.

3/20

## 20/00412-13 Kunning um Korona -Økið til Poding

| Viðgjørt av | Fundardagur | Málnr. |
|---|---|---|
| 1 Býráðið | 21.12.2020 | 3/20 |

**Kommunustjórin 20.12.2020**
Stjórin á Suðuroyar Sjúkrahúsi hevur gjørt vart við at tørvur verður á at poda fyri Korona í 2021, og at økið í Trongisvági er sera væl egna til at fremja hetta arbeiði.
Kommunustjórin hevur loyvt Suðuroyar Sjúkrahús at halda áfram við at poda fyri Korona á økinum við ítróttarhøllina í Trongisvági, -hetta fyribils fram til 31. Januar 2021, og at loyvið verður givið mánað fyri mánað.

**Býráðið 21. december 2020:**
Málið var kunna og umrøtt

Fundurin lokin kl. 18:30

Kristin Michelsen

Anita Vibergsdóttir

~~Alvi Mortensen~~

Kristina Roest

Bjarni Hammer

Súsanna Bertholdsen

Bogi Johannesen